afturat teimum omanfyri nevndu útlendsku bólkunum, meðan røddin hjá Ólavi sveimandi og skakandi syngur tekstin hjá Jens: »Volmar súkklar niðan brekku, dettur. Reisist ikki aftur. Volmar súkklar niðan brekku, dettur. Letur eygað aftur«.

Eitt annað remiks, ið fall beint í mína jørð, var »Grøðing«, ið Bookworms hava gjørt burturúr minutt-langa fjósalagnum »Heilabruni«, eisini saman við Com-Data. Tað er rátt og skróvandi, men samtíðis vakurt, kontant og klingandi. Ein lekkur samanseting av ljóðum, ið eg annars slett ikki hevði ímyndað mær kundu fáast burturúr einum lutvíst friðarligum og myrkum lagi sum »Heilabruni«.

### Fjøllini syngja í ørviti

Mær dámar best »Fjøllini standa úti«, bæði upprunaútgávuna og remiksið, sum Com-Data hava gjørt. Arrangementið er væl gjørt, knívskorið. Fangandi soleiðis, sum tað eigur at vera. Serliga tað eina brotið í útgávuni, ið er remiksað, har Kári Sverrisson syngur »Fjøllini. Fjøllini. Fjøllini hava fepur!« og so kemur eitt larmut, rútmu-baserað petti, ið ristir ígjøgnum kroppin á tær. Eg føli næstan, hvussu fjøllini hava fepur. At tey standa úti í kuldanum og syngja í ørviti. »Sum stórir operasangarar klæddir í grasi, syngja fjøllini«, ið Jóanes Nielsen so meistaraliga hevur skrivað.

Heildin er fantastisk, ein fullkomin pakki. Ein sýrut, eksperimenterandi, elektroniskt-ljóðandi blanding av løgum og tónum, ið geva assosiatiónir til føroyska náttúru, stórbýarlív, frið yvir grønar dalar, larm og stress og alt í senn. Hetta huglagið er eisini væl lýst á húsanum, har fløgurnar báðar snøgt sita í. Húsin er sniðgivin av Høgna Egholm Magnussen. Hann myndar ein eksploderandi stórbý; høg hús í logandi eldi við gráum skýggjum og flákrandi øsku. Aftaná eina løtu broytist heildin og sær síðani út sum um, at tað er húsin sjálvur, ið brennur, og at myndin av stórbýinum smeltar í loganum. Á sjálvari permuni er eitt skepilsi, ið sær út sum ein seyður í sólbrillum, svørtum klædningi og reyðum slipsi. Aftur ein væl gjørd og eisini stuttlig samanseting av primitivari náttúru og meira tjekkaðum stórbýarstíli.

### Allir tumlar upp

Eg veit, at summi hugsa »Hvat meinar tú við? Ein og hvør kann seta seg inn í eitt fjós og hamra á nakrar tunnur, meðan kýrnar brøla afturvið«. Sjálvandi kann ein og hvør gera tað, men ein og hvør kann ikki fáa eitt slíkt hugskot bara soleiðis; ein og hvør kann ikki skapa eitt so gjøgnumført konsept burturúr einum slíkum hugskoti; og ein og hvør hevur ikki eginleikarnar til at framleiða eitt so sparkandi feitt produkt, at tað gevur gásarhold ígjøgnum jørðina og upp millum bibburnar á tær, hvørja ferð tú lurtar eftir tí. So sjáldsom hugskot koma innímillum til nakrar útvaldar einstaklingar, sum einans við framúr listarligum handverki kunnu formidla hugskotini til nakað so einfalt sum eina fløgu. Ein lut, ið hvørt menniskja skilir og kann móttaka hugskotini ígjøgnum.

»Livandi Oyða« er ein útgáva, ið eg meti fer at slóða veg fyri mongum spennandi, nýskapandi tónleikaverkætlanum i komandi tíð. Tað er einki keðiligt at seta fingurin á. Løgini hava øll hvør sítt spennandi og serstaka ljóð. Útgávan er so original, sum hon kann vera, tá hugsað verður um heimagjørdu ljóðførini eins væl og elektroniska ljóðið, sum í grundini slett ikki er elektroniskt, men er skapt burturúr sampling-um av veruligum ljóðum.

Eg vil mæla øllum til at fáa sær fløguna í hendi, at lurta og hyggja. Tí óansæð um tær ikki dámar tónleikin, so er verkið áhugavert. Áhugavert á ein hátt, ið opnar fyri nýggjum møgu-leikum; ið víðkar sjónarringar og gevur eina kenslu av listarligum frælsi.

Hevði eg átt fleiri tumlar, høvdu allir peikað beint upp í loft. Eg havi einans tveir, men hesir eru báðir steyrrættir fyri tí meistaraverki, ið »Livandi Oyða« er. Fjósaprojektið ORCA fær herðaklapp, nógvar ballónir og konfetti frá mær. Eg síggi fram til at uppliva glíðibreytina til nýggjari, eksperimenterandi tíðir, ið verkætlanin ivaleyst fer at skumpa undir.

Seks stjørnur til Orca.

### FJØLLINI STANDA ÚTI

- Jóanes Nielsen

Fjøllini standa úti
Huld í támi og surrandi flugum
Sveipað í vindi
Og lítla ljóðinum frá svongum
rótum
Áirnar stoyta seg út í onki
Fjøllini syngja
Sum stórir operasangarar klæddir
í grasi
Syngja fjøllini
Leggi stetoskopið móti bringuni
Eitt hjarta av gróti og vatni
Dukar móti oyrunum
Eg spyrji hjartað
Hvussu hevur tú tað
Fjøllini standa einsamøll úti
Ongin bjóðar teimum inn
Míni fjøll standa køld úti í
myrkrinum
Tey frysta
Míni fjøll
Stórar rúgvur av sjúkum gróti
Fjøllini líða av svøvnloysi
Leggi stetoskopið móti einum
blomstri
Gjøgnum tveir plastikkleidningar
Angar klænt lív
Fjøllini hava fepur
Míni fjøll syngja í ørviti
Anga av rósum og villum
jarðberum
Fjøllini sleppa ikki inn um
kvøldarnar
Onki hotell tekur ímóti teimum
Tað er kalt at hava stjørnurnar til
tekju



*Jens L. Thomsen spælir á pelabassin*



*Tunnusettið er sett saman av ymsum tunnum úr fjósinum*



*Kúgv nr 65 syngur melodiin í fyrsta lagnum »Volmar«, ið annars er instrumentalt*




*Fjósið hjá Niels L. Thomsen bleiv gjørt um til upptøkuhøli við alskyns heimagjørdum ljóðførum*